# Miðflokkurin: Eftirlitið við rúsdrekkalógini skal herðast

**Miðflokkurin í samgonguni tekur ikki undir við broytingunum, sum ætlanin er at gera í rúsdrekkalógini og sum fara at gera tað lættari at fáa skeinkiloyvi**

SKEINKING
*Áki Bertholdsen*

Tað verður trupult hjá Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í Vinnumálum, at fáa undirtøku í samgonguni fyri teimum ætlanum hann hevur um at broyta rúsdrekkalógina.

Tað er greitt longu nú, áðrenn málið er komið til viðgerðar.

Tann eini samgonguflokkurin, miflokkurin, hevur nevniliga longu gjørt greitt, at hann tekur ikki undir við beroytingunum.

– Miðflokkurin tekur ikki undir við at broyta rúsdrekkalógina soleiðis at tað verður frælsari at fáa skeinkiloyvi, sigur Jenis av Rana, tingmaður floksins.



*Tey, sum halda brúdleyp, føðingardag ella aðrar hátíðardagar í bygdarhúsi ella samkomuhúsi, skulu nú eisini sleppa at skeinkja, uttan at gera seg til lógbrótara*

Tingmaður floksins sigur at hann tí hevur heitt á løgmann at taka málið upp til viðgerðar í samgonguni, tí miðflokkurin vil eisini hava ymsar brytingar í rusdrekkalógini.

### Gera tað ólógliga lógligt

Jenis af Rana heldur lítið um grundgevingarnar fyri at broyta rúsdrekkalógina.

– Ein grundgeving er, at tað verður skonkt ólógliga, tá ið ymisk tiltøk eru. Men ístaðin fyri at hava neyðugt eftirlit við lógina, ætlar landsstýrismaðurin bara at laga lógina til so at tað ólógliga verður lógligt og tað taka vit als ikki undir við.

– Vit halda ikki, at tað er er nøkur loysn. Vit eiga heldur at syrgja fyri, at lógin verður hildin.

Heldur enn at laga rúsdrekkalógina til, vil miðflokkurin tískil hava økt eftirlit við, at lógin verður hildin.

Hvussu tað skal gerast, hevur hann eisini eitt uppskot um.

– Tað tykist ikki sum um tann danski fútin í Føroyum er serliga áhugaður fyri at syrgja fyri at føroyskar lógir verða hildnar.

– Spurningurin er tí, um tað ikki hevði borið til at víðka heimildina hjá loyvisnevndini, so at hon eisini fekk myndugleika til at hava eftirlit við, at rúsdrekkalógin verður hildin, sigur Jenis av Rana.

Sostatt tekur miðflokkurin ikki undir við, at tað skal vera lættari at fáa skeinkiloyvi til einstøk tiltøk. heldur vil flokkurin hava skerpað eftirlit við rúsdrekkalógini.

Annars vil flokkurin eisini hava tað steðgað, at bryggjaríðini sjálvi sleppa at selja øl.

– Vit halda at ikki at bryggjaríini skulu sleppa at selja øl, tí tað er einans Rúsdrekkasøla Landsins sum skal hava loyvi at selja øl og rúsdrekka.

Hinvegin er flokkurin samdur um, at privatar veitslur ikki skulu verða umfataðar av rúsdrekkalógini.

– Hvat fólk gera tá ið tey halda veitslur, kunnu vit ikki leggja okkum út í, sigur Jenis av Rana.

# Avloysaraskipið hjá Smyrli komið

**Seinnapartin mikudagin kom skipið á Havnina, sum skal avloysa Smyril í tríggjar vikur**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



*Her liggur St. Ola á Havnini, hagar hon kom mikudagin. Næstu tríggjar vikurnar skal hon sigla ímillum Havnina og Suðuroynna*

Seinnapartin mikudagin kom ferjan á Havnina, sum tær næstu tríggjar vikurnar skal sigla ímillum Suðuroynna og Havnina ístaðin fyri Smyril.

Smyril fer í dag úr Føroyum til Frederikshavn í Danmark, har hann skal í dokk til ymsar umvælingar. Eitt nú skulu stabilisatorarnir umvælast, so at teir ikki fara so lætt aftur. Harumframt skal fitt av stáli skiftast í botninum, umframt at annað eftirlitsarbeiðið skal gerast.

Væntandi verður Smyril burtur í tríggjar vikur og ímeðan verður tað estlendska ferjan, St. Ola, sum skal røkja suðuroyarsiglingina.

Suni Andreassen á teknisku deild á Strandferðsluni, sigur, at ferjan bar seg væl á ferðini til Føroya. Men hon hevur í mong á siglt ímillum Scrabster í Skotlandi og Stromness í Orknoyggjum og tað er minst líka ringur sjógvur sum í Suðuroyarfirði so hon er bygd til ringan sjógv. Eitt nú hevur hon stabilisatorar bæði aftan og framman.

Nýliga hava estlendingar keypt St. Ola, sum annars er smíðað í 1971. Hon siglur 16 míl, hon tekur 120 bilar og 500 fólk, hon er góðar 86 metrar long og góðar 16 metrar breið, so munurin ímillum hana og Smyril er ikki stórur.

Í gjár lógu teir á Havnini og gjørdu klárt. Gekk sum ætlað, skuldi St. Ola sigla sin fyrsta túr ímillum Havnina og Suðuroynna í gjárkvøldið.

# Lættari og einfaldari rúsdrekkalóg

**Hetta eru nakrar av broytingunum, sum ætlanin er at gera í rúsdrekkalógini og sum miðflokkurin serligah eftir seg við**

RÚSDREKKALÓGIN
*Áki Bertholdsen*

Sum vit greiddu frá í Sosialinum fyrr í vikuni, ætlar Bjarni Djurholm at broyta rusdrekkalógina og hann hevur eisini lagt eitt uppskot fyri samgongufloklarnar um, hvørjar broytingar, hann kundi hugsað sær.

Hann ætlar, at hereftir skal tað í ávísum førum verða lættari at fáa loyvi at skeinkja í Føroyum, samstundis sum ætlanin er at gera rúsdrekkalógina smidligari at umsita, enn hon er nú.

Eitt endamál við broytingunum er eisini at fáa skipað viðurskifti á økjum, har tað í dag verður skonkt undir óskipaðum viðurskiftum og við ongum eftirliti.

Tí heldur hann, at tað skal bera til at fáa skeinkiloyvi til ávís tiltøk.



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður*

Tað er ikki loyvt í løtuni, men verður kortini gjørt uttan loyvi og uttan eftirlit, staðfestir Bjarni Djurholm og sostatt tálmar lógin ikki nýtsluni.

Og nú ætlar landsstýrismaðurin eisini, at tað skal verða loyvt at skeinkja í privatum veitslum, sum verða hildnar í bygdar- ella samkomuhúsum og har tey, sum halda veitsluna, sjálvi skipa fyri skeinking og borðhaldi.

Tað er tað nevniliga ikki eftir galdandi rúsdrekkalóg uttan so, at bygdarhúsið ella samkomuhgúsið hava skeinkiloyvi á jøvnum føti við gistingarhús og matstovur.

Landsstýrismaðurin heldur ikki at aldargamli siðurin, har fólk sjálvi leiga høli at halda brúdleyp og aðrar veitslur í, og har tey sjálvi syrgja fyri borðreiðing, mati og drekka, eigur at verða fevndur av rúsdrekkalógini.

– Slíkar veitslur eru privatar og av slíkum slagi, at tær einsvæl kundi verið hildnar heima, um pláss var. Tá ið skonkt verður á slíkum veitslum, eigur tað tí heldur ikki at koma undir rusdrekkalógina, sigur Bjarni Djurholm.



# Loynilig og spennandi kanning eystanfyri



*Granskar tú søgu, mást tú hava eina støðu, heldur Bent Jensen, søguprofessari, sum er kendur fyri ikki leggja fingrarnar ímillum, tá hann granskar fortíðina í gamla Sovjet*

*Mynd: Polfoto*

**Sera spennandi tilfar er funnið í skjalagoymslunum eystanfyri, sum lýsir støðu Føroya í kalda krígnum. Tað sigur Bent Jensen, søguprofessari, í arbeiðsfrágreiðing til løgmann. Í kanningini viðger hann, hvat slag av virksemi Sovjetsamveldið hevði kring Føroyar, og hvussu Føroyar og føroyingar koma fram í sovjetskum skjalagoymslum**

HINUMEGIN JARNTJALDIÐ
*Ingi Rasmussen*

Svartar útstrikingar á hvítum pappíri.

Kanningin av støðu Føroya eystanfyri undir kalda krígnum er loyndarfull.

Sosialurin hevur fingið innlit í fyribilsfrágreiðingina, sum søgufrøðingurin Bent Jensen, professari, dr. phil, hevur latið Føroya løgmanni síðst í desember. Men stórir partar av frágreiðingini eru strikaðir við svørtum blekki við tí grundgeving, at rætturin til skjalainnlit kann avmarkast, um tað er neyðugt fyri at verja uttanríkispolitisk áhugamál. Og víst verður eisini til, at tað er neyðugt at dyljað málið fyri at verja privat ella almenn áhugamál.

Hvat liggur í hesum dyljingum, er ikki gott at vita. Men út frá tí, sum stendur eftir av fyribilsfrágreiðingini, er greitt, at kanningin er stak áhugaverd – og óivað eisini umstrídd.

### Drúgv kanning

Frágreiðingin hjá Bent Jensen snýr seg um støðu Føroya eystanfyri í kalda krígnum árini 1945 til 1991. Bakgrundin er Føroyar sum »trædesten og baseområde i Atlanten«, sum søgudoktarin orðar tað.

Frágreiðingin tekur støði í, at Føroyar eru ein partur av NATO og harvið ein partur av trygdarpolitikkinum hjá vesturheiminum. Spurningurin er eitt nú, um trygdarváði hevur staðist av hernaðarligu støðunum í Føroyum.

Bent Jensen kannar føroysku støðuna í hernaðarligu ætlanini hjá Sovjetsamveldinum og Warszawa-samgonguni. Í hesum sambandi lýsir hann, hvussu sovjetski norðurflotin varð útbygdur, hvør flotaætlan varð løgd fyri Norðuratlantshavið, og hvørjar hernaðarligar venjingar vórðu havdar í havinum kring Føroyar.

Søguliga verður farið ígjøgnum leiklutin hjá Warszawa-samgonguni undir kalda krígnum við føroyskum brillum. Undir 2. heimsbardaga. Í tíðini til NATO varð stovnað í 1949. Í fyrsta »toybilinum« árini 1955-1964. Undir sovjetsku flotadubbingini í 1960-1970'unum. Og undir kalda krígnum í 1980'unum.



ambassade henvendte sig derpå til de … december 2001 …
Moskva.

[redacted] Hvad andet materiale angår, meddelte arkivet mig, at der intet yderligere fandtes. Fotokopierne måtte jeg ikke fjerne fra læsesalen, og jeg måtte derfor skrive dem af i hånden linie for linie, da man heller ikke tillod anvendelse af computer. Det materiale jeg fik lov til at se, var til gengæld meget interessant. Der er imidlertid tale om en alvorlig kronologisk skævhed, idet jeg ikke har fået adgang til materiale fra 1970-1980'erne.

Noget senere meddelte Forsvarsministeriets arkiv, at arkivet ikke rådede over dokumenter omhandlende … indlevere en ansøgning med angivelse af, hvilke …

*Kut úr fyribilsfrágreiðingini hjá Bent Jensen til løgmann um støðu Føroya eystanfyri í kalda krígnum árini frá 1945 til 1991*

### Persónar og vitjanir

Granskar tú søgu, mást tú hava eina støðu, heldur Bent Jensen, sum er kendur fyri ikki leggja fingrarnar ímillum, tá hann granskar fortíðina í gamla Sovjet.

Vesturheimurin ikki kann siga seg undan at hava kent til ta skipaðu útreinsingina av mannalívum og brotini á mannarættindini, sum fóru fram undir »hamara og segli«, heldur hann. Og tað er líka neyðugt at gera upp við tey fólk, ið kávaðu út yvir hetta í vesturheiminum, sum tað var at gera upp við nasismuna. Offrini vóru fleirfald eystanfyri, og tí fírir hann ikki fyri at nevna nøvn, tá tað kemur til skarpskeringar.

Tí stendur spenningurin og óttin kanska mest um, hvørt hann fer eftir teimum føroysku samhugafólkum, sum styðjaðu Sovjetsamveldið og tann politikk, sum stórveldið stóð fyri, tá harðast leikaði á.

Líkt er til, at leitað er í sovjetsku skjalagoymslunum eftir føroyingum, sum hava vitjað eystanfyri ella hava verið sannførdir kommunistar av ymiskum slagi.

Beint aftaná eina útstriking sæst í øllum førum, at útlendskar vitjanir í Føroyum, visumreglur, sovjetskar og aðrar vitjanir úr Warszawa-samgongulondum, og sovjetsk og eysturtýsk fiskiskip við Føroyar fáa serstaka viðgerð. Og tí er eisini hugsandi, at svarta blekkið fjalir útyvir føroyskar persónar og vitjanir hinumegin jarntjaldið.

»Meget interessant...«

Tað hevur ljóðað, at Bent Jensen hevur fingið atgongd til skjalasøvn hjá kommunistiska flokkinum í Sovjet. Men tað síggja vit ikki í frágreiðingini, og Bent Jensen vil enn onga viðmerking geva um sítt arbeiði, sum er fevnt av tagnarskyldu.

Hinvegin sæst, at hann hevur funnið nógv tilfar, sum hann heldur vera stak áhugavert. Hann hevur eitt nú leitað í skjalasavninum hjá Verjurmálaráðnum, hjá forsetanum, hjá herflotanum og í russiska statsskjalasavninum fyri nýggja søgu.

At tað hevur verið trupult, og at onkrir fótonglar eru lagdir í vegin, vitnar fyribils arbeiðsrapportin um.

Eftir eina longri útstriking stendur t.d. einastaðni soleiðis: »Hvad andet materiale angår, meddelte arkivet mig, at der intet yderligere fandtes. Fotokopierne måtte ikke fjernes fra læsesalen, og jeg måtte derfor skrive dem af i hånden linie for linie, da man heller ikke tillod anvendelse af computer. Det materiale jeg fik lov at se, var til gengæld meget interessent. Der er imidlertid tale om en alvorlig kronologisk skævhed, idet jeg ikke har fået adgang til materiale fra 1970-1980'erne«. Ikki er greitt, hvat skjalasavn talan er um í hesum føri.

Bent Jensen greiðir frá, at hann hevur funnið áhugavert tilfar eystanfyri, eitt nú í statsskjalasavninum, men yvirhøvur er galdandi, at tað síðstu fimm árini er vorðið torførari hjá granskarum at fáa atgong til tilfarið, sum lyftir lokið av søguni.

### Løgmaður uppí

Fyri at fáa betri atgongd, heitir Bent Jensen á Føroya løgmann um at venda sær beinleiðis til russiska uttanríkisráðið, tí Føroyar og Russland hava góð viðurskifti. Tað hava Danmark og Russlandi ikki fyri tíðina, og tí hevur tað helst seinkað og forða arbeiðnum, at fyrispurningar um innlit eru farnir umvegis danska uttanríkisráðið.

Bent Jensen mælir til, at løgmaður leggur dent á góðu viðurskiftini landanna millum. Tað er eisini vert at nevna, heldur hann, at kalda kríggið er av, at søgan nú kann skrivast sakliga, og at Føroya landsstýri roynir at skapa eina heildarmynd, sum ikki bara byggir á støðuna hjá stórveldunum vestanfyri.

Søgufrøðingurin ger eisini arbeiði í skjalagoymslum vestanfyri, og har hevur arbeiðið gingið betur. Men bæði eystan og vestanfyri er granskingararbeiði eftir at gera, áðrenn hann fær teknað nakra endaliga mynd av støðuni.

Bent Jensen er farin undir at skriva sjálva frágreiðingina, men av tí, at so nógv vantar, er tað av góðum grundum ikki endaliga frágreiðingin. Í skrivandi løtu er nýggja svartabók – ella kanska reyðabók? – umleið 150 síður. Kanningin byrjaði á heysti 2001 og verður liðug seinni í ár, tá hon verður handað løgmanni.